# TILTØK

**Hebron, Argir**
Mikukvøldið kl. 20 Vit møtast í húsbólkum. Samskipari: Mai L. Simonsen, tlf. 315226.

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
Mikukvøldið kl. 20 verður samkomufundur í Rhema.
Sunnudagin kl. 11 Møti og sunnudagsskúli.
Mánakvøldið 19. mai kl. 20 verður felagsbønarmøti í Kelduni í samband við Hvítusunnustevnuna. Bussur koyrir úr Havn. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Mikudagin kl. 15 Bønarmøti.
Hósdagin kl. 20 Heimaforbundið, vitjan av Birgit og Mariu, allar kvinnur eru vælkomnar.
Sunnudagin kl. 11 Halgunarmøti, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og kl. 18 farvælmøti fyri Major Knut Gamst. Øll eru vælkomin.

**Grøðanarmøti**
Møti við Inger og Hans Berntsen verður í Kommunuskúlaauluni í Havn hóskvøldið kl. 20 og í skúlahøllini í Trongisvági dýra biðjudag kl. 18 og leygarkvøldið kl. 20.

**Ebenezer**
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Dýri biðidagur kl. 18 Møti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið**
Týskvøldið kl. 20 Bíbliutími, Áps. kap. 10, 24-48.
Mikukvøldið kl. 19 venur Meinigheitskórið.
Dýra biðidag kl. 18 Møti v/ Jónsvein Joensen.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Thomas Thomasen.

**Karisma**
Hvítusunnustevnan 2003 verður í døgunum 6.-9. juni í Ítróttarhøllini á Hálsi, har tiltøk verða fyri allar aldursbólkar. Nærri verður lýst seinni.

**Samkoman Immanuel**
Mikukvøldið kl. 20 Møti.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti, øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í annaðkvøld kl. 19 Delli.
Fríggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
www.filadelfia.fo

**Saron, Vestmanna**
Mikudagin kl. 21 Útimøti á Torginum, kaffi í Saron aftaná.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við breyðbróting.
Telefonandaktin 424741.

**Ársmøti í Nesvík**
Ársmøti hjá Heimamissiónini verður 15.-18. mai í Leguhúsinum í Nesvík.
Hósdagin kl. 19.30 Sangmøti v/luttøku av streingjakóri úr Vágoynni og Petur Hans Hansen og Thomas Dam. Vitniløta kl. 22.15. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30, Zacharias Zachariassen talar. Evni: Bók Nehemiasar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Getsemane**
*á brekku 19*
Mikudagin kl. 20 Bønarmøti.
Profetisk bønarstevna við Gordon Grieve úr Kanada verður 15.-18. mai. Neyðugt er at melda seg til seminarini hjá Sannu Hammer á tlf. 517131. Kostnaður fyri øll seminarini er 150 kr.
Hósdagin er seminar kl. 20.
Fríggjadagin kl. 10-12 og 15-16.30. Leygardagin kl. 10-12 og 15-17 og Møti kl. 20.
Sunnudagin kl. 17 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 20 bíbliutími. Øll eru vælkomin.

**Betel, Vágur**
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 12. mai:*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-18 Veving á loftinum. Seyma teppir saman
**Tilmelding til túrin mikudagin á tlf. 316492.**
kl. 14-18 Kortspæl, landastrok, telving, dart og onnur spøl
*Týsdagin 13. mai:*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur, Jóhann R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Frásagnir, søgur, prát og annað
*Mikudagin 14. mai:*
kl. 10-15 Opið hús
kl. 15 Túrur oman í Rættará, Jákup Lindenskov, tilm. tlf. 316491.
*Hósdagin 15. mai*
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát – Brandur Petersen
*Fríggjadagin 16. mai:*
Dýri biðidagur, stongt.

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Tilhaldið í Sandoynni**
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl. 14–17.00. Drekkamuður er at fáa báðar dagarnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Mikudagin 14. mai*
Upplestur, Palli Dalsgaard lesur søgu.

**Dagtilhaldið í Vági**
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319630/61 655400.

**NA (Anomymir narkomanar)**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur er hvønn hósdag kl. 17.30 til 18.30 og sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20-21.30.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tórsgøta 5 (inngongd vestanfyri). Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

## V4-dráttur
### í drátti nr. 1486 10. mai 2003

**Tølini:** 7 - 16 - 18 - 19 - 27 - 33 - 43 - 50 - 57 - 58 - 59 - 72 - 77 - 80 - 82 -95

### Eingin vinnari
Vinningurin er fluttur til næsta drátt

### Eykavinningur
Í mai er eykavinningurin 5.000 kr. um mánaðin í eitt ár. Drigið verður leygarkvøldið 31. mai millum allar seðlar, sum spæla við henda mánaðin.

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## KONFIRMATIÓN

### Konfirmantar í Kollafjarðar kirkju Dýra Biðidag 16. mai kl. 11.00

**Úr Kollafirði**
Finnbogi Kristmar Ferjá Joensen
Kári Kristiansen
Jóna Mikala Baisakhi Davidsen
Frida Andrea Marie Jacobsen
Malan Djurhuus
Sólrun Petersen
Durita Djurhuus
Turið í Homrum
Sóley Mørch Poulsen

**Av Signabø**
Niklas Reginsson (Konfirmatiónin verður hildin í Gjáargarði)

**Úr Tórshavn**
Mourits Amund Mikkelsen, Mýrisnípuvegur 37, 100 Tórshavn
Rósa Christiansen, Niðaragøta 98, 188 Hoyvík (Konfirmatiónin verður hildin í Gjáargarði)

### Konfirmantar í Kvívíkar kirkju 4.s.e. páskir 18. mai kl. 12.00.

**Úr Kvívík:**
Marna Joensen
Karina Müller
Frank Müller
Lív Reginsdóttir
Gert Góðadal
Dánial Bærentsen

**Av Stykkinum**
Sára Jónsdóttir Carlsson
Benjamin Rasmussen

**Úr Leynum**
Petur Johansen

## BRÚDLEYP

1. mai *giftust* í Prestagarðinum í Lamba Andrea Olsen og Bjarni Kjeld, Saltangará.

Leygardagin 17. mai giftast í Sandavágs kirkju Birita Petersen, Sandavágur og John Heri Mouritsen, Sørvágur. Veitslan verður hildin fyri innbodnum í SÍF-húsinum.

Leygardagin 14. juni kl. 14.00 giftast í Rituvíkar kirkju Annfríð Eliasen, Leirvík og Jan Herman Hansen, Rituvík. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í veitsluna, biðjast vinarliga siga frá á tlf. 443252 ella 447622 í seinasta lagi leygardagin 31. mai.








**Landssjúkrahúsið**
FO 100 Tórshavn

## Deildarøkonoma

Í køkinum á Landssjúkrahúsinum er fast hálvtíðarstarv sum deildarøkonoma leyst at søkja til setan skjótast gjørligt .

**Førleikakrøv**
- útbúgving sum økonoma
- fakligt ágrýtni og góð samstarvsevni
- leiðsluroyndir
- teldukunnleiki á brúkarastøði
- áhuga og fleksibilitet í mun til uppgávurnar
- royndir og evni til at motivera og menna starvsfelagarnar
- royndir við Dankost 3000

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt spennandi og avbjóðandi arbeiði
- eitt arbeiðspláss í menning
- møguleikan fyri at seta tín dám á framtíðina í Køkinum
- at arbeiða saman við góðum og dugnaligum starvsfeløgum

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Økonomafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Gudnu á Rógvi Joensen, leiðandi økonomu, telefon 31 35 40, lokal 274.

Umsóknarfreistin er 23. juni 2003 kl. 12.00.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO Tórshavn

## Miðvágs–Sandavágs skúli

**Søkt verður eftir 4 lærarum í tíðaravmarkað størv skúlaárið 2003/2004.**

- **2 fulltíðarstørv við 26,5 tímum um vikuna**
- **2 størv til umleið 40 tímar um vikuna at býta í 2**

**Størvini eru vegna farloyvi, lækkað tímatal, eftirútbúgving, avlopstímar og serligan tørv.**

Størvini verða lønt samb. avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 - 27.4

Fleiri upplýsingar kunnu fáast frá skúlastjóranum telefon 33 28 20 ella 33 23 18.

Umsóknir skulu vera Gitte Samuelsen, skúlastýrisformanni í hendi í seinasta lagi 27. mai 2003 kl. 14.

**Skúlastýrið fyri Miðvágs-Sandavágs skúla**
v/ Gitte Samuelsen
Traðarvegur 32
FO 360 Sandavágur

## Heimarøktin Eysturoy

### Eldrasambýlið á Skála

Søkt verður eftir fólki at arbeiða sum náttarvakt á eldrasambýlinum á Skála at byrja 1. juni 2003 ella skjótast tilber.

Ynskiligt er at viðkomandi hevur útbúgving sum heilsuhjálpari ella aðra líknandi útbúgving, eins og neyðugt er at hava kunnleika og royndir innan eldrarøkt.

Starvið verður lønt eftir sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

### Avloysarar at arbeiða úti í Heimarøktini Eysturoy

Samstundis verður søkt eftir heilsu- og/ella heimahjálparum at arbeiða í summarfrítíðini runt um í økinum.

Ynskiligt er at viðkomandi hevur útbúgving og ella/royndir innan eldrarøkt.

Størvini verða lønt eftir sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Ásu Hanusson, økisleiðara, tlf. 449249.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

**Heimarøktin Eysturoy**
Postboks 47
Heilsumiðstøðin
620 Runavík

## M/B Dúgvuberg til sølu

Um nóg høgt boð fæst, er trolbáturin Dúgvuberg, Klaksvík, til sølu.

Eisini kann tilboð gevast uppá felagið sjálvt.

Áhugað kunnu senda skrivlig tilboð til:

**Sp/f Dúgvuberg**
Boks 125
700 Klaksvík

## Hvalbiar skúli

Søkt verður eftir 1 lærara í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2003/2004.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkum 18.1 – 27.4.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi týsdagin 27. mai 2003.

**Skúlastýrið fyri Hvalbiar skúla**
v/ Róin Schrøter
850 Hvalba

## HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo




Týsdagin 13.05. kl. $22^{15}$ Mikudagin 14.05. kl. $22^{15}$
Hósdagin 15.05. kl. $23^{15}$




Týsdagin 13.05. kl. $19^{30}$ Mikudagin 14.05. kl. $19^{30}$
Hósdagin 15.05. kl. $20^{30}$




Týsdagin 13.05. kl. $21^{15}$ Mikudagin 14.05. kl. $21^{15}$
Hósdagin 15.05. kl. $18^{15}$ – *Seinasta sýning*




Týsdagin 13.05. kl. $19^{15}$ Mikudagin 14.05. kl. $19^{15}$ – *Seinasta sýning*

### KOMANDI FILMAR




**Frumsýning**
**Hósdagin 15.05.**
**kl. 19.30 - 22.00**




**The Matrix Reloaded**
**Frumsýning**
**Mikudagin 21.05.**
**kl. 00.02 - 19.30 - 22.15**
**Forsølan er byrjað**